## DAGSINS MEINING

# Fast undir fótum í Vágsbotni

### *- og á ferð kring alt landið*

Nú Sosialurin er fluttur í Vágsbotn eru arbeiðsumstøðurnar munandi bøttar. Skjótari og lættari verður at koma í samband við tær mongu keldur, sum húsast í høvuðsstaðnum og her serstakliga í miðbýarhjartanum tað veri seg umboð fyri bæði løgting og landsstýri men eisini fólk flest, sum koma og fara í hesum so livandi stað.

Einhvør tíð hevur broytingar við sær. Sosialurin hevur nú í mong ár havt redaktiónir og blaðfólk úti kring landið. Vit hava spjatt kreftirnar fyri á tann hátt at røkka alt landið. Nú vit hava fingið atgongd til góð høli í høvuðsstaðnum hava vit eisini roynt at savna fleiri góðar kreftir her enn talan var um á Argjum. Hetta m.a. fyri at skapa eitt professionelt journalistiskt umhvørvi. Og fyri at kunna møta teimum mongu og spennandi avbjóðingum, sum nýggi bústaðurin hevur við sær.

Vit hava tí eisini gjørt broytingar í bygnaðinum. Eitt nú hava vit niðurlagt redaktiónir okkara í Saltangará og í Sandavági. Vit varðveita tó redaktiónirnar í Suðuroynni og í Norðoyggjum. Nú tað er so skjótt at koma í Vágar og í Eysturoynna úr Havnini vóna vit at kunna røkka búplássunum í hesum oyggjum umframt í Norðstreymoy og í Sandoynni við okkara rullandi redaktión.

Ein partur av Vágsbotnverkætlanini er tí at menna rullandi redaktiónina. Og hetta ber væl til, tí vit nú fara at røkja tænastuna kring landið við tveimum bilum. Tað skal vera okkara vón, at fólk kring landið fara at taka væl ímóti okkara koyrandi tíðindatænastu, tá hon verður alt meira sjónlig kring landið.

Vit vilja vit hesum eisini takka teimum mongu í Saltangará og í Sandavági og í umhvørvunum har, sum hava stuðlað okkum. Tað skal vera okkara vón, at vit við hesum broytingum ikki minka um okkara virksemi kring landið men heldur tvørturímóti kunnu menna og víðka tænastuna til at fevna um allar bygdir og býir uttan fyri høvuðsstaðarøkið.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Veit Útvarpið ikki av andstøðuni

**Finnur Helmsdal**
*tingmaður fyri Tjóðveldisflokkin*



»Mangt er broytt viðvíkjandi føroyskum politikki«, hoyrir tú so mangan tikið til. Nú hevur ein ikki so nógvar fyritreytir fyri at taka dagar ímillum, um so er. Men tá tað snýr seg um Útvarp Føroya og tað, sum fer fram á føroyska politiska pallinum, so er nógv broytt, síðan verandi landsstýrissamgonga tók við í februar 2004. Frá 1998 til 2003, tá Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin mannaðu samgongu, svitaðist ikki, at umboð fyri Javnaðarflokkin blivu tráspurd av Útvarpinum um hvørt einasta orð, sum fall í tinginum, ella kom úr Tinganesi.

Sagt varð mangan, at Javnaðarflokkurin rak ein nógv meira aktivan andstøðupolitikk enn Sambandsflokkurin. Sannleikin var bara tann, at fjølmiðlarnir, bløðini saman við Útvarpinum, góvu veljarunum eina mynd av, at Javnaðarflokkurin var aktivur andstøðuflokkur. Fjølmiðlarnir góvu ikki javnaðarfólki frið eina einastu løtu. Tey spurdu og bóðu um viðmerkingar um hvørt nikk og prikk. Ja, um alt.

Nú Tjóðveldisflokkurin er størsti flokkur á tingi, og nú hann situr í andstøðu, kemur tað sera sjaldan fyri, at Útvarpið spyr nakran tjóðveldistingmann um nakað sum helst. Kanska tá tað snýr seg beinleiðis um tjóðskaparmál, men sera sjaldan tá tað um samfelagslig mál ræður.

Feskasta dømi er, nú Kaj Leo Johannesen skýtur upp, at peningurin skal fylgja sjúklinginum, og at hann í ávísan mun sjálvur kann avgera, hvar peningurin verður brúktur. Her ella uttanlands.

Hvat ger Útvarpið? Jú, teir spyrja fyrst formannin á tingin fyri Fólkaflokkin og síðan umboðið hjá Javnaðarflokkinum í trivnaðarnevndini. Útvarpið hevur ikki spurt nakran tjóðveldistingmann um hetta mál. T.v.s. at Útvarpið spyr ikki andstøðuna um eitt so víðgongt uppskot.

Í Danmark hevði tílík framferð verið mett sum álvarsligt brot á allan fjølmiðlasið. Har spyrja teir altíð andstøðuna allarfyrst. Men kanska hugsa tey í Útvarpinum nakað soleiðis: »Andstøðan er so fáment, samgongan kann gera hvat hon vil«. Tað er ikki lutur Útvarpsins at hugsa um, hvat vinnur frama ella ikki. Lutur Útvarpsins er at fáa málini lýst frá øllum síðum.

# Ómynduggerð – Verjar

***Javni hevur sent øllum løgtingslimum soljóðandi skriv:***

Mikudagin 20.04.05 verður skrivligur fyrispurningur frá løgtingsmanni Finni Helmsdal til landsstýrismannin í innlendismálum Jógvan við Keldu um ómynduggerð og verjar svaraður á Føroya Løgtingi.

Galdandi lóg á økinum fyri Føroyar er ein donsk lóg frá 1922, sum gevur teimum, ið tørva verja, eina óvirðiliga og sera trupla viðgerð, sum oftast viðførir ómynduggerð. Galdandi lóg fyri sama øki í Danmark er frá 1995, sum gevur teimum, ið tørva verja, eina virðiliga og sera lætta viðgerð, sum sera sjáldan viðførir ómynduggerð. Henda nýggja danska lógin kann við kongligari fyriskipan setast í gildi fyri Føroyar, (sí grundgevingarnar hjá Finni Helmsdal fyri fyrispurninginum á heimasíðu Føroya Løgtings). Javni hevur í tolni bíða eftir tí nýggju føroysku lógini, sum hevur verið lovað okkum nú í meira enn trý ár.

Innlendismálaráðið upplýsir, at arbeitt verður við málinum, men at hetta er eitt stórt og tíðar-krevjandi arbeiði. Og at tað tí onki kann sigast um, nær vit kunnu vænta eina nýggja føroyska lóg.

Landsstýrismaðurin í innlendismálum Jógvan við Keldu sigur í viðmerking til hetta málið í Dimmalætting nú ein dagin, at hann helst vil hava alt familjurættarliga økið (heruppií er so eisini lógin um ómynduggerð og verjar) yvirtikið á føroyskar hendur fyrst.

Vit síggja alt oftari, hvussu óvirðilig okkara gamla danska lóg er fyri tað fólkið, Javni umboðar. Tí loyva vit okkum at heita á tygum sum løgtingslim at virka fyri, at vit, meðan vit bíða eftir einari møguligari nýggjari føroyskari lóg, fáa ta nýggju donsku lógina fyri hetta økið setta í gildi fyri Føroyar. Sambært okkara upplýsingum frá sakkunnleikanum er hetta lætt og lítið arbeiðskrevjandi at gera - so at siga bert ein avgreiðsluspurningur.

Vit loyva okkum at gera vart við, at hesaferð snýr áheitan Javna seg ikki um nakað, sum kann fara at tyngja fíggjarliga - men einans forstáilsi fyri, at ein frammanundan í so mangar mátar skerdur samfelagsbólkur ikki framhaldandi fer at fáa eina óvirðiligari viðferð enn neyðugt, bara tí at okkara lóggevandi ting ikki kann seta eina nýggja danska lóg í gildi í staðin fyri eina avgamla danska lóg - meðan bíða verður eftir einari møguligari nýggjari føroyskari.

Hetta skriv er sent øllum løgtingslimunum. Tað verður eisini sent teimum báðum størstu føroysku bløðunum fyri kanska á tann hátt at fáa onkran, sum kennir trupulleikarnar, núgaldandi lóg kann viðføra, frá dagliga lívinum, at hjálpa okkum við at ávirka myndugleikarnar til at fáa nýggju donsku lógina setta í gildi beinanvegin.

Vegna starvsnevnd Javna,
**Malena Arnholdsdóttir, form.**
**Torfinn Hentze, starvsnevndarl.**

# Fyrispurningur til Fuglø Arkitektar og Runavíkar kommunu

**Dia Ellindsson**
*Smærugøtu Runavík*

Hvat røkist fyri teimum 24 smærri íbúðunum, sum ætlanin er at byggja?

Hví gongur tað so seint?

Verður hetta egg ella ungi?

Ella er kanska meiningin, at ein verður noyddur at flyta kommunu vegna pjakan og dýrkandi óløgir?


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.